# SAMKYNDA ANNA STÓR-TRÍVIST Í VÁGI

**– TAÐ ER LÆTT HJÁ MÆR, AT FINNA KVINNUR, SUM VILJA ROYNA SAMKYNDA VEGIN. MEN AT FINNA EIN MAKA ER EIN ONNUR SØGA, SIGUR 24 ÁRA GAMLA ANNA DJURHUUS. HON ER SAMKYND OG BÝR Í VÁGI**



INTERVIEW
Barbara Holm
barbara@sosialurin.fo

24 ára gamla vágsgentan Anna Djurhuus hevur ongantíð verið bangin fyri at standa við sín samleika. Hon smæðist ikki, hóast hon brýtur nógv frá vanliga lívinum hjá ungum føroyingum. Hon hevur altíð vitað, hvør hon er, og á ungum aldri greiddi hon familju, vinum og kenningum frá sínum seksualiteti.

### Vágur er paradís á jørð

Hóast mong helst ivast í, hvussu góðar umstøðurnar hjá samkyndum munnu verða í Føroyum, so er í øllum førum ein samkynd kvinna, sum heldur Føroyar verða paradís á jørð.

Anna Djurhuus er fødd og uppvaksin í Vági, og hon býr har framvegis. Á ungum aldri varnaðist hon, at hon ikki var sum hinar vinkonurnar. Henni dámdi gentur. Meðan hinar vinkonurnar tosaðu um dreingir, so var tað ikki eins áhugavert fyri hana. Hon helt, at tankin um at mussa eina gentu var spennandi, hóast hon ongantíð hevði roynt tað.

MYND: JENS KRISTIAN VANG



*Eg stúrdi fyri, hvussu mamma og pápi fóru at taka tað. Men tá ið avtornaði stuðlaðu tey mær, sigur Anna Djurhuus*

Sum 12 ára gomul royndi hon fyri fyrstu ferð at mussa eina gentu, og tá hvarv ivin.

– Eg visti beinan vegin, at eg var til gentur. Tað føldist gott og rætt uppá allar mátar at mussa eina gentu. Men eg var lívsrædd fyri, hvat fólk fóru at siga. Hvat tey fóru at halda um meg. Og um tey, sum eg eru góð við, fóru at góðtaka meg, greiður Anna frá.

Og ístaðin fyri at greiða sínum nærmastu frá sínum kenslum, valdi hon at tiga tað burtur í vónini um, at kenslurnar fyri gentum fóru at hvørva.

– Eg trúði eg kundi ignorera tað, og helt tað tí innan í mær í langa tíð, sigur Anna.

### Sannleikin má fram

Árini gingu, men kenslurnar hjá Annu fóru ongan veg. Tær vóru væl fjaldar, men sum ein tikkandi bumba brast Anna, tá ið hon var 14 ára gomul.

– Eg mátti siga tað fyri mínum nærmastu. Eg kundi ikki halda tað innan í longur, tí ivin var ikki til staðar. Eg visti, at eg var til gentur, greiður Anna frá.

Sum 14 ár greiddi hon vinkonunum og beiggja sínum frá sínum kenslum. Men foreldrini fingu ikki sannleikan at vita, fyrr enn nøkur ár eftir. Mamman, tá ið Anna var 16 ár, og pápin, tá ið Anna var 18 ár.

– Eg stúrdi fyri, hvussu mamma og pápi fóru at taka tað. Men tá ið avtornaði stuðlaðu tey mær, sigur Anna.

Hóast hon í fleiri ár hevði borið ótta fyri ikki at verða góðtikin, so vísti